# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Teir, sum ætla sær at søkja at Iran, verða handbrotnir, áðrenn teir fáa loyst tað fyrsta skotið av*
*Iranski forsetin*

# Pakistan fyrireikar svar



*Merriott-hotellið fór illa av bumbuni og eldinum, sum breiddi seg sera skjótt orsakað av einum gassleka*
*Mynd: Polfoto*

**Pakistanska stjórnin lovar at geva teimum hernaðarligu bólkunum eitt hóskandi svar upp á ta ógvusligu atsóknina at Merriott-hotellinum**

Enn hevur eingin átikið sær ábyrgdina av teirri ógvusligu bumbuatsóknini at Merriott-hotellinum í Islamabad um vikuskiftið, tá 53 fólk lótu lív, og meiri enn 260 vórðu særd. Rehman Malik, sum er ráðgevi hjá stjórnini í innanríkisviðurskiftum, er kortini ikki í iva um, at tað var annaðhvørt Taleban ella al-Qaeda ella kanska bæði í felag, sum skipaðu fyri atsóknini.

- Atsóknir av hesum slagnum hava altíð bent okkum á leiðirnar á markinum millum Pakistan og Afghanistan, sigur hann við bretska kringvarpið BBC. Í hesum økinum er tað ógvuliga avmarkað, hvat teir pakistonsku myndugleikarnir hava at siga, og tí hava tær víðgongdu rørslurnar næstan frítt at fara har. Men nú lovar pakistanska stjórnin at fremja neyðug hernaðarlig átøk í marknaøkinum sum svar upp á bilbumbuatsóknina um vikuskiftið.

### Var ikki málið

Tað eru tey,sum halda, at tann sterka spreingingin var als ikki ætlað Merriott-hotellinum. Pakistanski forsætisráðharrin, Yousuf Raza Gilani, sigur við pakistanska blaðið The Dawn, at tað upprunaliga bumbumálið var for sætisráðharrabústaðurin, har fleiri av landsins fremstu politikarunum sótu og ótu døgurða, tá spreingingin var.

Men trygdartiltøkini gjørdu, at bumbumaðurin slapp ikki til bústaðin hjá forsætisráðharranum, og tí snaraði hann lastbilinum og rendi hann inn í portrið uttan fyri hotellið, har hann sprongdi 600 kilo av spreingievni í luftina.

Gilani, forsætisráðharri, sigur, at herurin fer at svara álopinum, men at teir, sum vilja lata myndugleikunum síni vápn, fáa høvi til tess uttan rættarsókn. Hann sigur eisini, at avvarandi hjá teimum, sum doyðu í atsóknini, fáa fíggjarliga hjálp frá tí almenna. Tey særdu fáa eisini, men minni.

### Leita eftir dana

Nakrir danir vóru á Merriott-hotellinum, tá spreingingin var, og ein teirra er ikki komin afturíaftur. Uttanríkisráðið í Keypmannahavn hevur váttað, at talan er um ein mann, sum arbeiddi fyri fregnartænastuna hjá donsku løgregluni, PET, og at hann var í Pakistan og hjálpti sonsku sendistovuni har við trygdarviðurskiftum.

Danski sendiharrin í Pakistan, Anders Hougård, segði við kringvarpið DR í morgun, at fólk hjá sendistovuni leita framvegis eftir tí horvna manninum. Sendiharrin segði, at umleið 250 sjúkrahús eru í økinum, og at leitað verður allastaðni.

Donsku fjølmiðlarnir søgdu í morgun, at tað eru ógvuliga smáar vónir um at finna tann horvna PET-mannin á lívi.

# Livni var við til at beina fyri irakskum vísindamanni

**Sum agentur hjá ísraelsku fregnartænastuni Mossad beindi Tzipi Livni fyri einum irakskum vísindamanni**



*Fyrrverandi Mossad-agenturin Tzipi Livni*
*Mynd: Polfoto*

Í síðstu viku bleiv Tzipi Livni vald til formann í ísraelska stjórnarflokkinum Kadima, og alt bendir tí á, at hon skal taka við sum forsætisráðharri, tá Ehud Olmert fer frá fyrst í næsta mánað.

Tað er alment kent, at Tzipi Livni var agentur í ísraelsku fregnartænastuni Mossad, tá hon var yngri, og nú eru fjølmiðlarnir farnir at róta í hennara fortíð. Millum annað er komið fram, at hon arbeiddi á Mossad-deildini í París í áttatiárunum, og at hon var við, tá Mossad drap ein irakskan kjarnorkuvísindamann í franska høvuðsstaðnum í1983 við at geva honum eitur. Um hetta mundið arbeiddi stýrið hjá Saddam Hussein við at útvega sær kjarnorkuvápn, og Mossad hevði fingið til uppgávu at forða tí.

Tzipi Livni hevur sýtt fyri at gera nakra viðmerking til tað, sum er komið fram um hennara tíð í Mossad. Ein fyrrverandi leiðari í fregnartænastuni, Ephraim Halevy, sigur við bretska blaðið Times, at at Tzipi Livni var við í einari servandari deild hjá Mossad, men hann vil ikki siga, hvørjum uppgávum deildin tók sær av.

## STUTT SAGT

### London nýggja floghavn

Borgarstjórin í London, Boris Johnson, hevur sett umsitingina til at tekna eina nýggja floghavn til býin. Verður ætlanin veruleiki, verða tær báðar verandi floghavnirnar, Heathrow og Gatwick, latnar aftur.

Tann nýggja floghavnin skal eftir ætlanini hava fýra lendingarvallir vog skal byggjast nærhendis munnanum á Themsenánn. Mett verður, mat tað fer at taka seks ár at gera ta nýggju floghavnina. Samstundis skal ein jarnbreyt til snartok byggjast millum floghavnina og London, soleiðis at tað fer at taka ein hálvan tíma at koyra hvønn vegin.

Boris Johnson sigur við Time, at tá hug verður eftir tí, sum verður gjørt í øðrum stórum býum so sum Hongkong og Washington, so vísir tað seg at bera væl til at flyta sjálvt tær størstu floghavnirnar.



*London fær nýggja floghavn fyri Heathrow og Gatwick*
*Mynd: Polfoto*

### Amerikanar í tjøldum

Búskaparkreppan í USA hevur havt við sær, at nógvir amerikanarar hava mist síni hús ella sína íbúð, og í fleiri býum síggjast altsamt fleiri og fleiri tjøld, har heimleys fólk royna at búleika sum frægast.

Tíðindamaðurin hjá norska blaðnum Aftenposten skrivar, at nú eru slíkir tjaldbýir at síggja um alt USA, og talsmaðurin hjá teimum heimleysu sigur við blaðið, at tað er eingin ivi um, at altsamt fleiri amerikanarar verða fátækir og heimleysir.

Í býnum Reno í statinum Nevada fáa tey heimleysu mat frá sonevndum suppukøkum, sum hjálpa teimum heimleysu og fátæku í býnum. Nevada er serliga meint raktur av kreppuni, og eingin statur hevur havt so nógvar tvingilssølur sum har.